Kommunufelagið

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
3. november 2017

Okkara j.nr.
17/01959-9

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr.

**Viðv. Uppskoti til kunngerð um dálking frá oljutangum**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskot til omanfyri nevndu kunngerð.

Uppskotið er sent einstøku kommununum til viðmerkingar. Sum skilst, hava Tórshavnar, Runavíkar og Skúvoyar kommuna sent viðmerkingar sínar beinleiðis til tykkara.

Kommunufelagið tekur undir við teimum viðmerkingum, ið einstøku kommunurnar hava sent inn.

Harumframt skal Kommunufelagið viðmerkja fylgjandi:

Umframt tær uppgávur, ið kommunurnar nú skulu umsita sambært uppskotinum, eru kommunurnar somuleiðis skipanar-, byggi- og eftirlitismyndugleiki, og tí eigur kunngerðin yvirskipað at verða soleiðis skipað og orðað, at hon kann umsitast sum ein integreraður partur av teimum uppgávum, sum kommunurnar longu hava á nevndu økjum.

Somuleiðis skal viðmerkjast, at sum viðmerkingarnar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum frá juli 2017 eisini vísa á, so eru onnur lóggávuøki, ið marka upp móti uppgávunum, ið kommunurnar skulu taka sær av. Tí er týdningarmikið, at greitt kompentansubýti er millum myndugleikarnar og at hædd er tikin fyri hesum í nevndu kunngerð.

Vísandi til omanfyri standandi og til tær viðmerkingar, ið eru komnar frá omanfyri nevndu kommunum, mæla vit til, at viðmerkingarnar verða gingnar ígjøgnum í felag  t.d. á einum arbeiðsfundi saman við umboðum frá HIMR, US, KF og frá Tórshavnar og Runavíkar kommunu, soleiðis at kunngerðin beinanvegin kann fáast at virka í praksis.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**